

*Líkini vórðu løgd inn í Stranda Kirkju, sum meira enn aðrar kirkjur er sjómanna-kirkja. Tað eru nógvar olmussur lovaðar henni av neyðstøddum sjómonnum*



*Tað eydnaðist at bjarga einum luti av Ernestinu, nevniliga ein krampi. Hildið verður at hann er úr lugarinum*

niður undir aftur. Eg fór fram á bógvin beinanvegin, og tað fóru teir flestu. Tað var einki at gera. Skipið var farið á land, tað var einki at gera við tað. Sum vit stóðu har, fór ein maður nú og annar tá, so tað var ringt skil, einki soleiðis stuttligt. Tað vísti seg at vera leingi til dagur kom, náttin var long. Bestimaðurin og eg, vit stóðu tilsamans og ein annar maður, Sigmund Brest úr Skúvoy, og vit hildu í hvønn annan. Jóan Magnus (bestimaðurin), hann fór avstað, hann fór á sjógv. Og eg mátti so sleppa honum. Tað var ikki nakað sum æt. So, tað var eitt grúiligt tumultur, sum tá var, og einki kundi gerast fyrr enn tað lýsti. Eg veit ikki.

Hann (skiparin) snakkaði so við meg um at prøva at fara í land. Eg dugdi væl at svimja, men tað var ikki tespuligt at fara. Mær hevði dámt betur at farið leysur, men tað hildu hinir ikki.

**Og tá var tað blivið ljóst?**
Ja, tá var tað blivið ljóst. Tá sást land, og tað var berg fyri, kann mann kalla. Har var ein urð, og til alt held var fjøra, men tað var nógv brim.

**Var tað langt í land?**
Ja, tað var nokkso langt. Eg fór so. Eg dugdi væl at svimja, so tað hugsaði eg einki um.

**Tygum svumu nógv sum yngri?**
Grúiliga nógv, ja, ja. Tað vóru nógvir javnaldrar hjá mær, sum svumu nógv. Ja, so fór eg at prøva. Jú, tað gekst illa at sleppa á land, men tað endaði við, at eg slap á land.

**Og høvdu tygum enda á tygum, tá ið tygum komu á land?**
Nei, tá hevði eg ikki enda á mær. Eg loysti endan av mær, tí hann darvaði meg so nógv. (Ziska hevði enda á sær, tá hann byrjaði at svimja.)

**Men tygum fóru ikki aftur á borði alíkavæl?**
Nei, ikki aftur á borði.

**Tá ið so tygum komu uppá land, hvussu var so at koma upp?**
Tað var ringt at koma upp. Tað var grúiliga strævið at koma úr briminum upp í urðina. Tað var ringt. Men sum sagt, eg slapp upp. Tað var leingi, tað var tað, men eg slapp uppá land. Teir róptu so grúiligt úti frá skipinum, tað hoyrdi eg, men eg hoyrdi lítið, hvat tað var. Men sum eg forstóð, knýttu teir eitt bjargingarbelti í eina línu at reka í land, og eg sá tað. Tað kom inn ímóti landi hetta bjargingarbeltið. Tað gekst illa at fáa tað, men til alt held var ein fiskihaki komin har. Hann var nokkso langur, og eg fekk í bjargingarbeltið. So skundaði eg mær at gera fast um ein stein, ein klett. Tað tók eina góða løtu, so nú koma teir, nú kemur onkur í land, tað sá eg.

**Teir komu í land eftir endanum?**
Ja, eftir endanum. Vindurin var nú grúiliga nógvur, men tað vísti seg fyri mær, sum um at tað bleiv minni brim tá fjøra bleiv. Eg veit ikki, hvør ið kom aftaná annan, tað veit eg ikki.

Men eg fór so at royna alt fyri eitt, tá nakrir vóru komnir, at fáa at vita, hvussu vit skuldu sleppa upp. Har var so grúiliga høgt, høgur bakki. Skalvurin var so stórur, men eg slapp upp ígjøgnum kavan.

Tað vóru forskelligir sum lyftu meg, sum hjálptu mær upp. Eg veit ikki, eg var grúiliga illa komin, og eg minnist til tað, tá eg kom upp á bakkatromina. Tá var nokk so langt millum kavan og bakkan, tað var opið niður ímillum. Eg veit ikki, so skavaði eg og skavaði og skavaði. Tað endaði við, at eg slapp upp, men eg var grúiliga illa fyri.

**Tað vóru kanska fleiri sum vóru illa komnir?**
Ja, teir vóru illa komnir, men tað máttu teir vera.

**Og hvussu nógvir mans vóru tit so sum bjargaðust?**
Vit vóru 17.

**Tað vóru so níggju, sum fórust?**
Ja.

**Kláraðu allir menninir seg, allir teir sum komu á land?**
Illani, vit máttu seta tveir eftir, søgdu teir. Eg var uppí teimum fyrstu, og teir royndu at fáa meg heim fyrst. Tann eini doyði. Summir vóru næstan naknir, summir vóru skóleysir.

**Teir hava ikki fingið tíð at lata seg í?**
Nei, tað vóru ringar umstendig-heitir, og tað var so ringt í sjónum.

**Og høvdu teir so hingið hálv-naknir í regninginum alla náttina eisini?**
Ja, tað kann man kalla. Tað vóru fáir, sum vóru í oljuklæðum. Eg var so ikki í oljuklæðum. Eg hevði onga húgvu, tað minnist eg væl. Eg hevði arbeitt í lastini, og eg fór beinanvegin upp í regningin.

Og so fór eg niður aftur, tí eg visti ikki, hvar eg skuldi vera. Alt kundi fara hvørja løtu. Tað var meira brim enn so.




*Í Reykjavík búðu teir flestu av manningini á Hotel Hekla. Høvdið á brævpappírinum*



*Eli Eltør hevur helst funnið krampan í vrakluti, sum rak inn í fjøruna*

**Tá tit komu upp – har var jú einki hús fyri?**
Einki hús var fyri, nei. Men vit vistu, hvar vit skuldu ganga, tí vit vistu hvar vit vóru. Tað var farið vestur eftir.

Vit sóu fýrtornið á Selvogsnesi fyrst. So bleiv gingið, so bleiv gingið, og so komu vit til hús, sóu nøkur hús. Tað var so nógvur kavi.

Vit vóru grúiliga væl móttiknir. Og eg fór so í song beinanvegin. Eg visti so ikki meir, hvat ið gekk fyri seg tá. Og eg minnist væl til, tá eg vaknaði upp aftur, var seingin full av ull. Har var grúiliga smáligt í tí húsinum, sum vit komu til. Men rímiligt, tey royndu hvat tey kundu.

**Skipið var tað liggjandi so leingi tit sóu?**
Ja, so leingi vit sóu. Men tað fór vist nakað skjótt. Vit fóru nakrir sum orkaðu út aftur morgunin eftir. Tá var hvørki eitt ella annað at síggja. Vit funnu trý lík har. Tað var einki at gera við

**Hvussu komu tit so heimaftur?**
Vit komu við Verdandi, Elias Sofus Hansen í Norðragøtu førdi hana. Hann var inni á Tórleifs-høfn, og hann kom eftir okkum. So førdi hann okkum til Grindavík. Har komu bilar eftir okkum og koyrdi okkum til Reykjavík. Vit fóru so heim við Drotningini.

(Her kann skoytast uppí, at á ferðini heim var skipað fyri innsavning millum yvirmenn og ferðafólk til kransar "til dem af os, der ikke naaede Fædrelandet i levende live," sum tað verður sagt av heimildarmanni.)

**Ziska, tygum fingu fleiri heiðurstekin fyri hetta bragdið?**
Ja, eg fekk fleiri heiðustekin. Eg fekk eitt gullur frá ministeriinum.

**Tað var sjófartsministeriið?**
Tað var sjófartsministeriið. Og so fekk eg eina medalju frá Carnegiefondin.

**Og tygum fingu pengar eisini?**
Ja, pengar eisini.

## Beskeðin hetja

Her endar samrøðan,. Tað er týðiligt, at Ziska ikki hevur hug at tosa um tann heiður, sum er vístur honum. Hetta beskedni ger hann tó ikki til eina minni hetju. Men hann fekk millum annað 800 kr frá Carnegiegrunninum. Hetta var ein heil ársløn hjá fiskimanni tá á døgum. Her kann eisini verða skoytt uppí, at Ziska frá teimum, sum komu frá hendingini við lívinum, fekk eina myndabíbliu og eina ljósakrúnu, sum framvegis er í familjuni.

## Koman til Reykjavík

Her kann eisini nevnast, at menninir komu til Grindavík við Verdandi kl. 7 á kvøldi og komu til Reykjavíkar við bili kl. 10. Tveir av teimum komu at búgva á sjómansheiminum hjá Frelsunar-herinum í miðbýnum, meðan 15 komu at búgva á Hotel Hekla. Hetta var sama hotellið, har manningin á Acorn búði aftaná sorgarleikin har umborð í 1928. Hetta var meðan teir bíðaðu eftir at sleppa avstað aftur.

Líkini vóru sett inn í eitt kapell. Her helt ein prestur talu yvir teir deyðu, og manningar á føroyskum skipum, sum lógu á Reykjavík